**Kári á Rógvi**
**løgtingsmaður**

Løgtingið

**Løgtingsmál nr. 28/2011: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um haugers styrelse og drift**

# Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um haugers styrelse og drift

**§ 1**

Í lov nr. 172 af 18. maj 1937 for Færøerne om haugers styrelse og drift m.m., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 77 frá 25. mai 2009, verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 36 verður sett sum stk. 2:
   "*Stk. 2.* Kommunur kunnu vetrarfriða innangarðs samsvarandi bygdar- ella býarskipan. Kommunur skulu, tá ið vetrarbitið er ogn, gjalda haga ella eigara fult endurreisingarvirði, so hagin ber sama áseyðatal sum áður; tá ið vetrarbitið er landsogn í festi, verður festikonta ella Búnaðargrunnur at endurgjalda mista inntøku."
2) § 37a verður orðað soleiðis:
   "**§ 37a.** Í seinasta lagi fýra vikur eftir, at endurgjaldsmálið er endaliga avgjørt, skal upphæddin rindast hagastýrinum (ella eigarum, um onki stýri er).
   *Stk. 2.* Tá ið snýr seg um landsjørð, verður endurgjald rindað festaranum av festikontu ella úr Búnaðargrunninum sum endurgjald fyri mista inntøku næstu tíggju árini; endurgjaldið verður goldið virkna festaranum yvir tíggju ár.
   *Stk. 3.* Er hagin felagshagi við bæði landsjørð og ognarjørð, verður endurgjaldsupphæddin goldin hvørjum eigara sær, ávíkavist hvørjum festara sær."

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**Almennar viðmerkingar:**

Uppskotið varð sett fram í tingsetuni 2009 og 2010, men var ikki liðugt viðgjørt, og verður tískil lagt fram aftur.

Uppskotið er ópolitiskt og hevur til endamáls at taka afturíaftur ta semju á tingi, sum tingmálini nr. 44/2009 um broyting í hegnlógini og nr. 76/2009 um broyting í hagalógini vístu at vera til staðar.

Broytingin í uppskotinum ber í sær tvinnar høvuðsbroytingar í hagalógini.

Fyrst verður ásett, at kommunustýri fáa heimild at vetrarfriða landsjørð innangarðs.

Á henda hátt slepst undan teirri ógreiðu, sum stendst av, at privatrættarligar avtalur verða gjørdar av vetrarfriðing. Endurgjaldskyldan er eyðvitað ymisk alt eftir, um talan er um ogn ella lands (kongs). Ognin hevur rætt til at verða hildin skaðaleys, hava sama áseyðatal eftir friðingina, og tí má fáa ábøtur sum veltan av haga og nýggj seyðahús. Landsjørðin kann vetrarfriðast við at rinda festara endurgjald fyri mista inntøku.

Síðan verður ásett, at festari av landsjørð fær endurgjald fyri inntøkumiss sín goldnan av festikontu ella úr jarðargrunni. Harvið fær festari veruliga miss sín endurgoldnan og fær tí ikki endureisingarvirði ella marknaðarvirði, sum eigarar av ognarjørð hava rætt til, og sum eftir umstøðunum kann vera nógv hægri enn avkastvirðið. Uppskotið leggur harvið fyri almenna partin av jørðini heimildirnar hjá tí almenna í hendurnar á kommununum, ið fáa greiða heimild at fremja miðvísa vetrarfriðing av almennu jørðini.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Fíggjarligu avleiðingarnar verða mettar soleiðis:

*Búnaðarstovan:* kann fáa nakað av øktari umsiting.

*Búnaðargrunnurin:* kann fáa nakað av øktari umsiting; harumframt skal Búnaðargrunnurin bera endurgjaldið, ið ikki rúm er fyri á festikontum.

*Festikontur:*

1) Munandi upphæddir kunnu verða goldnar av festikontum. Hvussu nógv veldst um, hvussu tann mista inntøkan verður mett, og um pengar eru tøkir á viðkomandi festikontu. Vanliga inntøkan av seyði er bert fáar tíggjutalstúsund ella í mesta lagi nakrar fáar hundraðtalstúsund krónur árliga fyri hvønn festara fyri alt seyðahaldið. Virðið av vetrarbitinum er bert partur av hesum. Tí eru typisku upphæddirnar, ið hvør festari fær fyri í mesta lagi 10 ár, helst áleið 100.000 – 1.000.000 krónur.
2) Munandi minni verður goldið inn á festikontur ella vetrarbitskontur enn higartil, tí landið frásigur sær vetrarbitsendurgjald í mun til endurreisingarvirði.

*Festarar:* Missa einki, tí teir eiga ikki rætt til avloyst vetrarbit; landið eigur rættin til avloysingargjald fyri vetrarbit og hevur ikki nakra skyldu at gera festikontu tøka hjá festara.
*Kærunevndin í lendismálum:* kann fáa nakað av øktari umsiting.

*Búnaðarstovan:* kann fáa nakað av øktari umsiting.

*Kommunur:* kunnu koma at gjalda sera munandi milliónaupphæddir, tá ið talan er um ognarjørð, men tær gera sjálvar av, hvørt tær brúka heimildina. Av landsjørð fáa kommunurnar ongar beinleiðis útreiðslur, men kunnu fáa nakað av øktari umsiting.

*Búnaðarstovan:* kann fáa nakað av øktari umsiting.

Meiri nágreiniliga viðmerkt.

**Til 1)**:

Ásett verður greið og avgjørd heimild hjá kommunustýri at vetrarfriða, um talan er um "Vintergræsningsret," bæði tá ið landið eigur, og tá ið privat eiga.

Mannagongdin verður sum higartil við meting. Broytingin liggur í, at ikki longur er neyðugt at gera privatrættarligar avtalur, men vetrarfriðingin kann fremjast sum fyrisitingarlig avgerð. Henda má tó eyðvitað fylgja vanligum reglum um hoyring, grundgeving osfr., umframt møguliga broyting í býarskipan, umframt at mannagongdin í § 37 í hagalógini skal fylgjast.

Enn sum áður fær tann, ið eigur bø ella trøð, rætt til bit á vetri, men má hegna fæ inni.

**Til 2)**:

Ásett verður, at festarin fær ikki endurgjald fyri mista ogn, eins og eigari av haga fær; heldur fær festarin skaðabót fyri veruliga miss sín sum leigari av jørðini. Festari má soleiðis ávísa, hvussu stór skattskylduga inntøka hansara var av viðkomandi rakstri av seyði, og hvussu nógv inntøkan minkar, tá ið vetrarfriðað verður, men síðani draga frá fyrimun av at fáa meiri gras ella avgrøði (tí festið fevnir um lendi, ið verður vetrarfriðað og tí ber størri summargrøði) til antin sama seyðahald ella til annan rakstur sum t.d. neytahald.

Endurgjaldið verður goldið virknum festara yvir 10 ár – tvs. letur festarin festið frá sær fyrr, steðgar endurgjaldið, tí festarin skal júst fáa endurgjald fyri sín egna veruliga miss tey árini, hann framhaldandi er virkin.

At Búnaðargrunnurin í øðrum lagi skal gjalda, merkir, at tá ið pengar ikki eru á viðkomandi festikontu at fíggja avloysingina, skal Búnaðargrunnurin gjalda av stovnsfæi sínum.

**Á Løgtingi, 4. august 2011**

Kári á Rógvi
løgtingsmaður